Fylgiskjal 10

Klaksvík 25.07.2026

Viðmerkingar til Løgtingslóg um serstakar fiskidagar til bólk 5b fyri fiskiárið 2026.

Meginfelag Útróðrarmanna tekur ikki undir við lógaruppskotinum, ið Fiskimálaráðharrin leggur fyri tingið.

MÚ hevur gjørt vart við hendan (afturvendandi) trupulleikan í fleiri ár, og hevur einki ímóti at fáa hjálpt bólki 5(b), men ikki á hendan hátt.

Harafturat hevur uppskotið onga heimild í Sjófeingislógini, og samsvarar ikki við umsitingarætlanina. Talan er um eina serlóg, ið ikki á nakran hátt samsvarar við førdan fiskivinnupolitikk.

Eisini verður nevnt, at talan er um at flyta óbrúktar fiskidagar. Tíverri samsvarar tað ikki við veruleikan, tí í 2025 vórðu allir fiskidagar í bólki 5 brúktir. Hetta er ein sera ódámligur háttur at argumentera uppá, og serstakliga vandamikil leið fyri Løgtingið at ganga.

Tað er ikki luturin hjá MÚ at føra politikk, men okkara rættur at tala at – serliga tá ið talan er um forfordeiling av rættindum; tað kennir MÚ tíverri alt til.

Umframt omanfyrinevnda, kann í kjalarvørrinum av ætlanunum hjá Fiskimálaráðharranum staðfestast:

1. Havstovan, manningarfeløg, reiðarafeløg, skipabólkar og virkir á landi tala at.
2. MSC góðkenningin er (møguliga) í vanda.
3. Allir skipabólkar kunnu bara hyggja at, meðan bólkur 5b fær fleiri dagar.

Er tað veruliga so, at Føroya Løgting skal renna ørindir fyri nøkur útvald?!

Bólkur 5b er ikki nakað eina-umboð fyri útróðrarvinnuna, nakra mentan ella yrki. Talan er í størstan mun um frítíðarsiglarar, ið ikki hava sítt høvuðsyrki innan útróður.

Hesi fiska tá tey tíma, ikki tí tað er neyðugt. Tað sæst eisini væl aftur í øllum hagtølum. Er fiskur á grunnunum, brúkar bólkur 5b nógvar dagar. Er tað vánaligt ella meiri vanligt, brúkar hann nógv færri.

(MÚ veit væl, at undantøk eru í 5b).

Sum áður nevnt, tað finnast fleiri aðrar – og góðar – loysnir. Td. inntøkumarkið aftur, sum skilmerkti fullrikin og ikki. Tað er skjótasti og lættasti háttur, kunngerðin liggur klár.

Annað er at luta fiskidagar í bólki 5b í tveimum ella fleiri umførum. Td helvtina í 1.jan og restina 1. juli. Tað ger, at dagarnir verða betri deildir yvir árið.

Yvirhøvur eru fleiri aðrir møguleikar, har allir eru betri enn uppskotið.

Tað er heilt víst soleiðis, at umsitingarætlanin kann gerast betri ella endurskoðast. Men hetta uppskotið er ikki ein gongd leið.

Vinarliga v/ Meginfelag Útróðrarmanna,

Finnbjørn Vang